# Hátíðarhildu nýggja landsstýrið

**Seinnapartin týsdagin var hátíðarhald í Skansapakkhúsinum í Tinganesi í sambandi við, at Løgtingið valdi Jóannes Eidesgaard til løgmann. Á hátíðarhaldinum handaði nýggi løgmaðurin landsstýrismonnunum setanarbrævið sum váttan fyri, at teir nú eru tilnevndir landsstýrismenn**



*Hesir garparnir hava stjórnað Føroyum í tilsamans 23 ár. Atli P. Dam hevur verið Føroya Løgmaður í 17 ár – Anfinn Kallsberg í seks ár…*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nýggi landsstýrismaðurin í heilsu- og almannamálum, Hans Pauli Strøm*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Anfinn Kallsberg, fyrrverandi løgmaður, ynskir nýggja løgmanninum, Jóannes Eidesgaard alt tað besta við nýggja løgmansembætinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Bárður Nielsen má sigast vera eitt satt stjørnuskot í Sambandsflokkinum. Hann varð fyrstu ferð valdur á ting í 2002. Afturvaldur hesaferð við 357 persónligum atkvøðum, og kann nú sessast í heita fíggjarmálaráðharrasessinum í glashúsinum á Argjum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Anna Petersen úr Vági saman við tveimum vágbingum, Kristiani Magnussen og Henriki Old. Anna er 89 ára gomul. Hon er langomma abbabørnini hjá nýggja løgmanni – eisini systir gamla bisp okkara, Eivind Vilhelm, sála*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Tveir fyrrverandi floksformenn, Helena Dam á Neystabø, sum nú er 1. varatinglimur hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi og Lisbeth L. Petersen, tingkvinna Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Nýggja landsstýrið: Johan Dahl, fiskimálaráðharri, Jógvan við Keldu, innlendismálaráðharri, Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, Jóannes Eidesgaard, løgmaður,Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, Hans Pauli Strøm, almanna- og heilsumálaráðharri og Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nýggi mentamálaráðharrin og fyrrverandi almannamálaráðharrin fáa sær*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Abbabørnini vitjaðu eisini nýggja løgmann. Á myndini eisini Eyðdis Eidesgaard, systir løgmans*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nýggi innlendismálaráðharrin, Jógvan við Keldu fær setanarbrævið frá løgmanni. Aftanfyri sæst fyrrverandi løgmaður, Jógvan Sundstein*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Á Restorffs Bryggjaríi høvdu teir gjørt eina serliga løgmansøl til høvið…*

*Mynd: Jens Kristian Vang*